## U17- og U19-bólkar klárir

Bæði U17- og U19-kvinnulandsliðini skulu næsta heyst spæla EM-undankappingar, og í farnu viku var lutakast um, hvussu bólkarnir síggja út, sum liðini skulu royna seg í. U17-kvinnurnar skulu spæla ímóti Wales, Russlandi og Grikkalandi, og teirra kapping verður í Russlandi frá 26. september til 1. oktober. U19-kvinnurnar (myndin) skulu spæla ímóti Norra, Holland og Hvítarusslandi, og teirra kapping verður í Norra frá 11. til 16. september.



## Komu ikki í finaluna

Liðið hjá Sólvá Dimon í donskum kvinnuflogbólti, Brøndby VK, spældi eina góða hálvfinalu í steypakappingini ímóti oddaliðnum, Holte IF, men mátti kortini lúta. Dysturin endaði 3-1 til Holte IF, sum sostatt skal spæla finaluna ímóti næstbesta liðnum, Fortuna Odense, sum í síni hálvfinalu vann 3-0 á Skovbakken Volley. Liðið hjá Sólvá vann 25-19 í fyrsta setti, men tapti síðani tey bæði næstu, 17-25 og 22-25. Í fjórða setti var Brøndby VK á odda ímóti endanum og hevði settbólt, men endaði kortini við at tapa settið 24-26, og sostatt streyk Holte IF avstað við finalusessinum. Í landskappingini er Brøndby VK nummar trý í Elitudeildini hjá kvinnum, sum er besta danska flogbóltsdeildin.

### Tjaldur-Stjørnan 20-31 (9-15):

# Stjørnan pakkaði út

**Hóast fleiri dagar enn eru til jólaaftan, høvdu spælararnir hjá Stjørnuni ikki tol at bíða, men valdu at pakka eina jólagávu út, sum er pláss í steypafinaluni. Stjørnan snøgt sagt knústi Tjaldur í Runavík í gjár**


einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Eina viku frammanundan hevði Stjørnan á heimavølli í Klaksvík víst tenn og vunnið trygt á Tjaldri við fimm málum, men nú kundi so roknast við, at Tjaldur á sínum heimavølli fór at svara aftur. Hesa ferð stóð eitt pláss í steypafinaluni upp á spæl, so nú var upplagt hvøi at vaska talvuna og byrja av nýggjum hjá teimum gulu.

Men tað fekk Tjaldur ongantíð møguleika at gera, tí longu frá fyrstu løtu setti Stjørnan seg tungt á dystin. Teir fyrstu 20 minuttirnir blivu eitt taktiskt kríggj, har Stjørnan týðiliga vísti seg at hava gjørt heimaarbeiði til lítar. Við agressivum verjuspæli vóru allar álopsroyndir hjá Tjaldri pilkaðar niður, og so skjótt Tjaldurskvinnurnar nærkaðust Stjørnuverjuni, fingu tær at føla, at longur sluppu tær ikki.



Valentina Suciu hjá Stjørnuni roynir at sleppa fram við Mary-Ann Isaksen hjá Tjaldri í dystinum í Runavík í gjár, sum endaði við stórsigri til Stjørnuna

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Tað gjørdi ikki støðuna hjá Tjaldri betri, at vanligi stórskjúttin, Adina Petrea, sjáldan slapp framat – og síðani brendi, tá hon kom sær í skotstøður. Og tá hon spældi hinar, megnaðu tær heldur ikki at fáa bóltin fram við vælspælandi Kristinu Griksaite í málinum hjá Stjørnuni, ið ikki gjørdi góða verjuspælinum framman fyri seg til skammar.

#### Rótut eftir steðgin

Síðstu løtuna av fyrra hálvleiki mundu tær hjá Stjørnuni fata, at taktiska kríggið var vunnið, tí nú fóru tær at hugsa meira um at spæla góðan hondbólt, og henda løtan var nógv tann besta í dystinum. Stjørnan leyp á við stórum hugflogi, og tá verjan hjá Tjaldri sá út til at hava fingið varandi mein, samstundis sum hvørgin málverjin tók stórvegis, lá væl fyri hjá gestunum.

Eftir steðgin var tað framvegis Stjørnan, ið stýrdi gongdini í dystinum, og hóast tað gjørdist nógv minni spæl og nógv meira rót, so megnaði Stjørnan at skjóta málini, tá møguleikarnir góvust, og tí endaði tað heila við einum reinum avsmurningi til Tjaldur, ið ikki hevur tapt ein dyst við 11 málum í fleiri ár!

Enn er seinna hálvfinalan eftir, men havandi í huga breiddina á Stjørnuliðnum, ið er nógv størri enn hjá Tjaldri, ið slett ikki skifti út mitt fyri, tí har var eingin at seta inn í staðin, so bendir einki á, at Tjaldur fer at megna at svara aftur upp á sama máta, men má royna at samla tankarnar um landskappingina, har tað eisini er Stjørnan, ið er størsta avbjóðingin.

**FAKTA**

**Tjaldur-Stjørnan 20-31 (9-15)**
**10 min:** 2-4
**20 min:** 6-10
**40 min:** 14-22
**50 min:** 18-27
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 11 (1), Jóhanna í Króki 3, Cornelia Rimbu 3, Annika Thomsen 2, Heidi Sevdal 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 9 (3), Joan Midjord Djordjevic 6, Valentina Suciu 5 (1), Durita Christophersen 4, Ella Petersen 2, Bára Skaale Klakstein 1
**Brotskøst:** Tjaldur 3, Stjørnan 5
**Útvísingar:** Tjaldur 7, Stjørnan 3
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

### VÍF-Kyndil 32-21 (19-9):

# VÍF væl á veg

**VÍF, ið sum uppflytari hevur spælt hálvt kappingarár í Sunset-kappingini, vísti Kyndli munin á at vera uppflytari og at vera niðurflytari, sum er á veg uppaftur í bestu kvinnudeildina**


einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Í fjør spældu VÍF-kvinnurnar í næstbestu deildini, men hóast tær liggja í botninum í Sunset-kappingini, bendir alt á, at hetta kappingarárið ikki verður so galið allíkavæl, tí leygardagin so gott sum spældu tær seg í steypafinaluna. Tað hendi við sigri á Kyndli, sum hevur øvugtu gongdina at vísa á, tí liðið í fjør spældi í Sunset-kappingini, men flutti niður, og nú liggur í toppinum í næstbestu deildini.

At tað ikki verður bara sum at siga tað hjá Kyndli at koma uppaftur, fekk liðið at sanna í Vestmanna leygardagin, tá VÍF veruliga fekk víst munin á bestu og næstbestu deildini. Við einum sannførandi sigri setti VÍF alt upp á pláss, og longu frá fyrstu løtu vísti tað seg, at kvinnurnar úr Vestmanna vóru nógv meira uppsettar og klárar til dystin.

Beinanvegin sást munur á, og bæði í verju og álopi royndist VÍF betri. Kyndil fekk ongantíð fatur í álopsspælinum hjá VÍF, sum trumlaði avstað og longu í fyrra hálvleiki hevði avgjørt dystin. Í seinna hálvleiki var munurin ikki so stórur, tá VÍF tók sær meira av løttum, men framvegis hevði fult tamarhald á.

Hjá heimaliðnum var mest eyðsýndi spælarin Liljan Djurhuus, sum saman við Agnas Olsen stóð fyri yvir helvtini av málunum. At Jórun Ludvig mátti geva avboð, gjørdi ikki støðuna hjá Kyndli betri, men neyvan var tað bara missurin av einum royndum spælara, ið gjørdi allan munin, tí á øllum plássum royndist VÍF betur og er væl á veg í steypafinaluna.

**FAKTA**

**VÍF-Kyndil 32-21 (19-9)**
**10 min:** 8-3
**20 min:** 14-6
**40 min:** 23-14
**50 min:** 27-17
**Málskjúttar**
**VÍF:** Liljan Djurhuus 9 (1), Agnas Olsen 8, Heidi Joensen 4 (1), Katrin Christophersen 3, Halla Midjord 3, Rakul Joensen 2, Linda Davidsen 1, Finngerð Jensen 1, Tóra Seloy 1
**Kyndil:** Guðrið G. Eystberg 5, Randi Wardum 5, Ásleyg Súnadóttir 4 (3), Súsanna Petersen 2, Linda Weihe 2, Maria Marjunardóttir Dahl 1, Turið A. Samuelsen 1
**Brotskøst:** VÍF 3, Kyndil 4
**Útvísingar:** VÍF 2, Kyndil 5
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason